# Gleða seg til at dansa í Gundadali

**Tey sleppa at dansa í hjartanum á ítróttarumhvørvinum í høvuðsstaðnum, millum fótbólt, hondbólt, flogbólt og aðrar itróttargreinar, um ikki so langa tíð. Talan er um dansifólkið í felagnum Dansifrøi, sum í hesi vikuni fingu sítt største ynski uppfylt: At fáa egin dansihøli. Nú verður so farið úr Hoydølum í Gundadal**

FELAGSHØLI
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*



*Jógvan Arge, varaborgarstjóri setti fyrsta spakan í*

Tey eru í kanska størri dansihýri enn nakrantíð áður, teir 400 limirnir í dansifelagnum Dansifrøi í høvuðsstaðnum. Orsøkin er sjálvsøgd. Eftir at hava bíðað eftir einum grundøki at byggja felagshús á í mong ár er spakin nú loksins settur í í Gundadali, og gravkýr eru farnar undir arbeiðið at skapa dansiglaðum í høvuðsstaðnum eitt dansihøli, sum so stórur tørvur er á.

Tað var Jógvan Arge, varaborgarstjóri, sum tók hetta fyrsta og týðandi stigið fram móti einum nýggjum og spennandi dansihølum í Havn og setti spakan í. Erling Jørgensen, formaður í Dansifrøi hevur bíðað eftir hesi løtu í mong ár, og hann er ein glaður maður: -Tað hevur verið sera møtimikið hjá okkum at flyta frá einum dansihøli í eitt annað og ongantíð hava okkara egna. Nú skal hetta broytast. Hann hevur verið virkin í Dansifrøi í 14 ár, av teimum 9 ár sum formaður, og tí ein teirra, sum hevur havt til uppgáva at tryggja mongu dansiglaðu limunum høli at dansa í. Tey hava so serstakliga húsast í Studentaskúlanum í Hoydølum, men eftir eldibrandin har hava tey verið noydd at finna onnur høli, eitt nú Veitsluhøllina á Landssjúkrahúsinum og Kappróðrarneystið á Argjum.

## Úr Hoydølum í Gundadal

-Vit eru takksom fyri at hava fingið innivist í Hoydølum og nú í Havn og á Argjum. Men tú fær ikki ment eitt felag og skapt ta røttu dansigleðina, um ikki limirnir kenna seg heima onkrastaðni, og tað fara vit nú um vónandi ikki so langa tíð sigur Erling Jørgensen, sum fegnast um, at tað loksins eydnaðist at fáa kommuna at peika á eitt grundøki.

-Tá vit so frættu, at vit kundu gerast grannar til alt ítróttarvirksemi í Gundadali trúðu vit ikki okkara egnu eygum. Kann bara siga vegna allar limirnar, at vit eru býráðnum takksom fyri, at hetta bleiv eitt so gott val eftir so drúgva bíðitíð.

Upprunaliga varð ætlanin at byggja eini felagshøli saman við felagnum Ljósinum, men í dag er tað so bara Dansifrøi, sum stendur fyri byggingini. Formaðurin sigur, at limirnir hava leingi savnað pening til bygging-

## FAKTA

Felagið Dansifrøi varð stovnað 25. janaur 1972.
Leingi hevur verið arbeitt við at fáa felagnum egin høli. Við hjálp frá undanfarna og núverandi býráðsnum er eydnast at røkka á mál, tó at hetta hevur tikið tíð. Í felagnum eru 400 limir.
Formaður er Erling Jørgensen.



*Glað andlit, sum síggja fram til at taka felagshølini í brúk*